Havnar Sjónleikarfelag:

# Oddvá Nattestad sett sum dagligur leiðari

**Í sambandi við at Oddvá Nattestad er sett sum dagligur leiðari í Sjónleikarhúsinum í Havn, varð móttøka við tónleikaframførslum, sangi og røðum í húsinum mikudagin 16. august**

MÓTTØKA

*Myndir: Magnus Gunnarsson*



*Oddvá Nattestad er sett sum dagligur leiðari í Sjónleikarhúsinum. Her er hon saman ommudóttrini Báru*



*Nevndin í Havnar Sjónleikarfelag: Rúna Mortensen, Anna Sofía Egilstrøð, Jytte Joensen, Karin Djurhuus, Sólvá Jónsdóttir, Oddvá Nattestad og Heðin Mortensen býráðsformaður. Jón Thorsteinsson vantar á myndini*



*Líggjas Joensen, beiggi Oddvá*



*Jórun Smith, systir Oddvá, og svigarinnan Hergerð Joensen*

Umleið 100 fólk vóru til eina hugnaliga móttøku í Sjónleikarhúsinum mikudagin 16. august í sambandi við at Oddvá Nattestad er sett sum dagligur leiðari í húsinum.

Limir í felagnum og onnur stóðu fyri upplestri, tónleikaframførslu, sangi og eisini vóru hildnar fleiri talur. Tey, sum framførdu, vóru: Gunhild V. Michelsen, Bjørg Jensen, Herluf Lützen, Fía Norðberg, Kamilla Sørwensen, Tóri í Hoyvík, Birgir Djurhuus og Heini Mortensen. Røður vóru hildnar av Karini Djurhuus, Jytte Joensen og Heðini Mortensen.

Havnar Sjónleikarfelag varð stovnað í 1918, og húsið varð bygt í 1926.

Nevndin í Havnar Sjónleikarfelag er sera virkin, og Sjónleikarhúsið hevur í longri tíð havt brúk fyri einum dagligum leiðara at taka sær av tí nógva virkseminum, sum er í húsinum. Tórshavnar býráð hevur verið ein dyggur stuðul hjá Sjónleikarhúsinum og altíð víst felagnum vælvild. Nú hevur býráðið játtað pengar til dagliga leiðaran.

Oddvá hevur havt tilknýti til Sjónleikarhúsið í mong ár og verið nevndarlimur í Havnar Sjónleikarfelag, hon var formaður frá 1989-91.

Húsið verður brúkt til nógv ymisk endamál, umframt til sjónleik til t.d. Føroyakvøld, dans, fundir, brúdleyp, veitslur og onnur mentanarlig og vinnulig endamál.

Nevndin í Havnar Sjónleikarfelag í dag sær soleiðis út: Karin Djurhuus, virkandi formaður, Anna Sofía Egilstrøð, kassameistari, Rúna Mortensen, Jón Thorsteinsson, Sólvá Jónsdóttir. Jytte Joensen er í farloyvi frá formanssessinum,vegna leikin um Edith Piaf, sum hevur premieru 14. oktober.







*Tónleikararnir Herluf Lützen og Kamilla Ravnsfjall og Fía Norðberg, sum las upp*



*Kári P. Højgaard, Nora Bærentsen, Sverre Nolsøe, Petur Dahl og Óluva Nattestad*



*Familjan Nattestad. Oddvá og Niels Nattestad saman við børnunum: Finnbjørg, Beinta og Ásbjørn og barnabørnum*